Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 12. apríl 2012**
Journalnr.: 10/00026-2

Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum* til hoyringar. Sí viðhefta fylgiskjal.

Í mun til galdandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum verður framd broyting í háttinum, sum landskassaveðhaldið higartil hevur verið gjørt upp í roknskapinum hjá Føroya Lívstrygging.

Í sambandi við fíggjarkreppuna í 2008 gjørdist landskassaveðhaldið virkið í roknskapinum hjá Føroya Lívstrygging. Landskassaveðhaldið verður virðisásett soleiðis, at tryggjað verður, at basiskapitalurin samsvarar við kapitalkravið hjá felagnum.

Hesin háttur at gera landskassaveðhaldið upp, førir við sær, at landskassaveðhaldið millum annað hevur ávirkan á kundakapitalin og kollektiva bonuspotentiali, eins og landskassaveðhaldið ávirkar skattliga yvir- ella undirskotið hjá felagnum.

Av tí at tað harvið er møguleiki fyri, at eginogn og kundaogn kunnu vaksa ógvusliga, hóast felagið hevur rakstrarligt undirskot, verður broyting framd í háttinum, hvussu landskassaveðhaldið skal upptakast í roknskapin hjá felagnum, soleiðis at landskassaveðhaldið heilt ella partvíst kann konverterast til ábyrgdar innskotsfæfeingi (ansvarlig indskudskapital).

Henda kunngerð fær eftir ætlan virknað fyri roknskaparár, ið byrja 1. januar 2011, og verða hesar reglur verandi í gildi, til tryggingarlógin verður broytt í heyst, og serligar reglur verða ásettar í kunngerð um uppgerð av grundarfæfeingi (basiskapitali).

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. apríl 2012. Viðmerkingarnar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til att. Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein